**Henrik Old**
**løgtingsmaður**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 118/2019: Uppskot til samtyktar um frágreiðing um ætlaðu royndirnar og útlitini fyri varandi vinnuligum fiskiskapi eftir reyðæti í føroyskum sjógvi**

**Uppskot**

**til**

**Samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið frágreiðing um ætlaðu royndirnar at fiska reyðæti í føroyskum sjógvi og hvørji útlitini eru fyri, at fiskiskapur eftir reyðæti verður skipaður sum varandi vinnuligur fiskiskapur.

**Viðmerkingar:**
Nú verður boðað frá, at Fiskimálaráðið hevur útskrivað trý royndarloyvir til royndir at fiska reyðæti við Føroyar. Hetta er eitt sera prinsipielt mál, at mann tekur avgerð um hetta, uttan at Løgtingið hevur havt møguleika at viðgera og úttala seg um, hvørt mann í heila tikið skal fiska reyðæti.

Noreg fiskar reyðæti við Suðurpólin, og norska stjórnin hevur givið loyvi til at fiska á leið 350.000 tons í norskum sjógvi. Hetta er gjørt, sjálvt um norsku fiskivinnufeløgini hava mótmælt harðliga.

Tað eru fleiri milliónir tons av fiski, sum um summarið eta serliga reyðæti í føroyskum sjógvi og her á leið.

Uppskotssetarin heldur tað vera at fara undir fiskiskap frá tí skeiva endanum, við tað at mann fyrst fer at fiska føðina, sum ein stórur partur av fiskinum skal liva av.

Tí verður skotið upp, at Løgtingið fær møguleika at siga sína hugsan um roynd eftir reyðæti.

**Á Løgtingi, 6. mars 2020**

**Henrik Old**